Søljan-VÍF 25-17 (16-5):

# VÍF í tungum sjógvi

**Frá at vera bara eitt brotskast frá FM-endaspælinum, er VÍF nú í akuttum niðurflytingarvanda. Leygardagin taptu tær greitt fyri Søljuni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakuð@sosialurin.fo*

Bara eitt stig skildi VÍF frá FM-endaspælinum í Sunset-kappingini, tá grundspælið var komið at enda. Somikið lítil var munurin upp til Kyndil, at hevði StÍF skorað við brotskastinum, sum tær høvdu í seinastu løtu móti Kyndli, so var tað VÍF, sum var partur av endaspælinum ístaðin fyri Kyndil.

Grundað á úrslitini í grundspælinum, so mundu fáur tó ivast í, at VÍF veruliga var eitt av teimum sterkastu liðunum í niðara endaspælinum. Eina minst mundu spælararnir sjálvar ivast í hesum, og kanska høvdu tær hug at ilskast um, at tær skuldu brúka alt várið upp á nakrar dystir, sum ikki høvdu stórvegis uppá seg. Tí niður mundi liðið ikki fara kortini.

Umberingin um, at dystirnir ikki hava nakað upp á seg, kann tó ikki nýtast meira. Nú tríggir av teimum seks dystunum eru spældir av endaspælinum, er VÍF næst niðasta liðið, og tí er vandin fyri niðurflyting vorðin heilt ítøkiligur.

Leygardagin stóð eisini greitt, at um ikki okkurt heilt álvarsligt verður gjørt, so fer VÍF eina deild niður til komandi kappingarár. Frá byrjan vóru tær á heimaliðnum munandi grammari enn gestirnir, sum als ikki fingu fótað sær. Viði at taka Ioanu Rápa úr spælinum, fekk Søljan skert størstu - og kanska einastu - álopshóttanina hjá gestunum, og í verjupartinum megnaði VÍF ikki at standa ímóti. Málini snøgt sagt skolaðu inn, og tá farið var til hálvleiks, stóð ikki minni enn 16-5 á talvuni. Ein støða, sum heimaáskoðararnir á Giljanesi valla hava sæð, síðani liðið flutti upp í bestu kvinnudeidina.

Eftir steðgin raknaði VÍF nakað við, men tað var ongantíð soleiðis, at spenningur av nøkrum slag stóðst um útfallið., Vertirnir kundu nú eisini taka tað nakað róligari, og uttan stórvegis hóvasták hildu tær leiðsluni allan vegin til dystarlok.

Og so kundu tær á heimaliðnum fegnast. Fleiri ferðir hava tær mest sum verið spáddar til beinleiðis niðurflyting, men higartil hava tær kortini hildið fast um sessin í fremstu deildini. Og við hesum sigrinum er sannlíkið fyri eini endurtøku í so máta eisini rættiliga stórt.

Hjá VÍF er talan av álvara farin at líkjast eini kreppu. Ikki bara skal liðið vinna sær tvey stig meira enn Søljan í teimum trimum seinastu dystunum, sum eru eftir at spæla. Tær skulu eisini vinna tey átta málini aftur, sum Søljan nú er frammanfyri.

Tí bendir nógv nú á, at seinasti dysturin á árinum verður ein sannur gysari, har VÍF og Søljan bæði tvey fara at spæla fyri lívinum í bestu deildini. Ein støða, sum avgjørt ikki var tað, sum VÍF hevði ætlað við kappingarárinum.

## FAKTA UM DYSTIN

**Søljan-VÍF 25-17 (16-5)**
**Málskjúttar**
**Søljan:** Heidi Maria Akselsen 10(1), Hertha Simonsen 4, Arnleyg Haraldsen 3, Petra Thomassen 3, Louisa Niclasen 3, Fía Selma Nielsen 1
**VÍF:** Torgunn H. Johannesen 4, Fríða Marjunardóttir 3(1), Finngerð Joensen 3, Ioana Rápa 3, Sóleyg Hórðará 2(1), Linda Johannesen 1, Jacklin Durhuus 1
**Brotskøst:** Søljan 1, VÍF 2
**Útvísingar:** Søljan 5, VÍF 1
**Dómarar:** Hallur Danielsen & Petur S. Dahl

Neistin-VÍF 26-33 (13-16):

# Meistararnir áttu meira í sær

**Unga Neista-liðið hevði leingi hug og dirvi at arga VÍF. Men seinasta partin an dystinum settu meistararnir tó tingini upp á pláss**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Ungu Neista-menninir hildu leingi eitt gott tak á royndu mótstøðumonnunum. Men í seinasta enda sigraði rutinan tó kortini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í mangar mátar mundi tað tykjast sum ein ótakksom uppgáva, sum Claus Rasmussen fekk, tá hann varð settur at taka sær av mansliðnum hjá Neistanum undan hesum kappingarárinum. Liðið var í endaspælinum í fjør klárt veikasta liðið í deildlini, og hóast hetta kappingarárið byrjaði væl við sigri á StÍF, so hevur verið púrasta svart síðani.

Við góðum treysti hevur Claus tó arbeitt við liðnum, og onkra tíð hava hampuliga stórir glottar verið at hóma í spælinum.

### Bitu frá sær

Og heimaáskoðararnir sunnudagin høvdu eisini nakað at fegnast um fyrstu longu løtuna, tá Neistin sunnudagin tók ímóti VÍF.

Hóast dómaraseðilin hjá VÍF borgaði fyri veruligum klassamuni á liðunum, so var hesin munurin ikki serliga sjónligur fyrstu løtuna. Neistin fylgdi væl við. Teir tordu at fara út at tackla skotsterku bakketuna hjá gestunum, og teir høvdu bæði hug og dirvi at pressa upp, tá teir vóru í álopi. Ikki minst var tað ein fragd at síggja Trónd Kragesteen, tá hesin ferð eftir ferð herjaði á gardarahøgu mótstøðuverjuna. Og í Magnus Matras hevði Neistin eisini ein málverja, sum fleiri ferðir kundi seta kvik mótálop ígongd. Mótálop, sum tó ikki vórðu nóg væl gagnn‡tt móti einum væl spælandi Zeljko Jotic í VÍF-málinum.

### VÍF hevði friðin

VÍF hevði soleiðis sínar trupulleikar, og í seinna hálvleiki tóktust hesir heldur ikki at hvørva. Fyrstu løtuna dróg Neistin soleiðis leiðsluna hjá gestunum aftur, og veruligt lív kom í bláu hallarhálvuna, tá Neistin skeyt seg upp á 17-16.

Onkur kundi kanska rokna við, at frustratiónir nú fóru at geras seg galdandi hjá gestunum, men tað hendi tó ikki. Drúgvu royndirnar á liðnum komu til sjóndar, tá menn nú slerdu kalt vatn í blóði. Funnu aftur á slóðina við at fáa grundelementini í spælinum at koyra, og so fekk Neistin ikki vart seg.

Serstakliga tók Áki G. Olsen nógv á seg, tá Neistaverjan tóktist leggja doyðin á at ansa eftir skotstyrkini hjá Sámali Joensen. Júst hetta er kanska eisini ein av størstu styrkunum hjá VÍF. Tí hóast fáur ivast í skotstyrkini hjá Sámali, so megna mest sum allir av hinum spælarunum eisini at gera um seg, og tí er trupult at fáa eina veruliga verju mótvegis samlaðu breiddini í álopinum. ein breidd, sum ikki er minni, nú Ingi Olsen aftur er partur av liðnum. Hann fær kanska ikki skotið tað stóra longur. Men hann dugir framvegis at fáa spælið at ganga, og tær ferðirnar, hann slapp inn um verjuna, legði hann róliga bóltin fram við málverjanum, sum hvørja ferð varð púrasta seldur.

### Halda finalusessinum

Soleiðis fekk VÍF at enda koyrt ein hampuliga tryggan sigur til høldar, og sum so munnu bæði spælarar og viðhaldsfólk eisini vera nøgd um hetta. Enn hongur liðið fast í finalusessunum, og fram til endan av endaspælinum er tað fyrst og fremst hetta, sum er málið.

Hjá Neistanum eydnaðist tað so heldur ikki hesa ferð at fáa stig til høldar. Men í mun til fleiri av undanfarnu dystunum, so s‡ndi liðið hesaferð, at menningin í spælinum hevur verið heilt ítøkilig. So er spurningurin, hvørt spælarar og venjari fáa frið og umstøður at halda fram í hesi menning, ella um talan aftur um eitt ella tvey ár verður um fráfall av spælarum, ella kanska ov nógvum styrki uttanífrá, soleiðis at egnu spælararnir detta burturímillum. Eitt fyribrigdi, sum oftani áður hevur verið at sæð hjá teimum bláu.

## FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-VÍF 26-33 (13-16)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Tróndur Kragesteen 9(3), Blagoje Buha 5(2), Kári Horn 5, Birgir Poulsen 3, Jens Mohr 1, Carl Herup Olsen 1, Karl Oddmar Rasmussen 1, Jóan P. Horn 1
**VÍF:** Áki G. Olsen 14(2), Sámal Joensen 4, Ingi Olsen 4, John Zachariassen 3, Daniel Rápa 3, Harald Bjørgvin 1, Agnar Joensen 1, Rói Lamhauge 1, Regin Joensen 1, Sjúrður Poulsen 1
**Brotskøst:** Neistin 6, VÍF 2
**Útvísingar:** Neistin 5, VÍF 8
**Dómarar:** Kristian Joensen & Karstin Joensen. Tóktust ikki nóg sannførandi